Álit

í

løgtingsmáli nr. 25/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin) (Heilivágsstigin verður broyttur)

Landsstýriskvinnan í heilsumálum, Margit Stórá, hevur lagt málið fram 29. september 2023, og eftir 1. viðgerð tann 5. oktober 2023 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 19. og 26. oktober og 9. november 2023.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við MEGD, Jóanis Erik Køtlum, CP-felagið, ADHD-felagið og landsstýriskvinnuna í heilsumálum, Margit Stórá, saman við Heilsutrygd.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jørgen Niclasen, Árni Skaale, Johan Dahl og Kaj Leo Holm Johannesen) hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið áleggur fólki, sum hava tørv á nógvum heilivági, eina stóra eykarokning.

Serliga seinastu 2 árini er vorðið munandi dýrari at liva. Tí tykist tað óskiljandi, at samgongan við einum spariuppskoti leggur eftir fólki, sum tørva heilivág.

Hetta er ikki einasta byrðan, samgongan leggur á okkara land. Í hesum føri á fólk, ið hava tørv á heilivági. Fólk, sum eisini fáa rød av øðrum rokningum frá landsstýrinum at rinda.

Sitandi samgongan hevur eina rúgvu av avgjaldshækkingum og lítið skiljandi spariuppskotum. Bæði persónar og vinna standa fyri skotum.

Fyri persónar:

- Hækka bensin- og dieselavgjald
- Hækka brennioljugjald
- Hækka el-prísin
- Hækka kringvarpsgjaldið
- Minka stuðulin til avlamisbil
- Hækka egingjaldið á heilivág
- Tey allar lægstløntu fáa hópin av avgjaldsrokningum, men ongan skattalætta. Harafturat velur samgongan at lækka teirra orkustuðul úr 12.000 kr. í ár niður í 5.000 kr. næsta ár
- Sum einasti bólkur er samtykt, at lestrarstuðulin ikki skal prístalsjavnast í 2024
- Útvald siglandi skulu sum tey einastu, ið arbeiða heimanífrá, missa frádráttir
- Sjómannafrádrátturin skal skerjast
- Og frádráttir hjá útisiglarum skulu takast burtur

Men:

- Vælbjargaði skulu hava stóran skattalætta

- Akademikarar hava í krónum fingið dupult so stóra lønarhækking sum sjúkrarøktarfrøðingar, og Yngri læknar fáa tríggjar ferðir so stóra lønarhækking sum sjúkrarøktarfrøðingar
- Sendifólk skulu umframt serskipan av ovurstórari skattafríari viðbót fyri maka og børn, eisini hava barnafrádrátt

Fyri vinnuna eru rokningarnar stórar:

- 4-falding av toppskattinum á alivinnuna, sum longu hevur kostað 140 arbeiðspláss
- Munandi hækking av tilfeingisgjaldi á fiskivinnuna og teirra manningar, upp í 36% av landingarvirðinum, t.v.s. áðrenn hýrur og útreiðslur
- Revsitiltøk móti Russlandi, sum bara raka føroyska veitaravinnu og tað meint
- Hækka bensin- og dieselavgjald
- Hækka brennioljugjald á vinnuna úr 0 upp til 100 oyru/ltr.
- Hækka tungoljugjald
- Hækka el-prísin munandi á vinnuna
- Nýtt stórt avgjald á F-gass
- Vinnan skal rinda fyri 7 teir fyrstu sjúkradagarnar í mun til 2 nú
- Vinnan rinda størri part av løn til lærlingar, tá teir eru í skúla

Meirilutin heldur, at øll átøkini hjá landsstýrinum gera Føroyar til eitt verri og ójavnari samfelag.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Hans Jacob Thomsen, Súsanna Bertholdsen og Liljan Weihe) hevur hesar viðmerkingar:

Tilskotsútreiðslurnar hjá Heilsutrygd til tilskotsheimilaðan heilivág eru øktar nógv seinastu árini. Tey fyrstu árini var lutfallið millum tilskot og egingjald á leið soleiðis, at Heilsutrygd rindaði tríggjar fjórðingar av heilivágsútreiðslunum í tilskoti, meðan brúkarar rindaðu ein fjórðing.

Gongdin, síðani skipanin varð sett í verk í 2010, hevur verið, at tilskotsútreiðslurnar hjá Heilsutrygd eru øktar nógv, eisini lutfalsliga meira enn egingjaldið hjá brúkarunum. Meðan egingjaldið hevur ligið á nøkulunda sama støði øll árini, eru útreiðslurnar hjá Heilsutrygd meira enn tvífaldaðar.

Endamálið við lógaruppskotinum er at røkka upprunaliga lutfallinum aftur, soleiðis at Heilsutrygd rindar tríggjar fjórðingar av heilivágsútreiðslunum, og brúkararnir rinda ein fjórðing.
Av tí at ongar broytingar eru gjørdar í heilivágsstiganum fyrr, og tað tí er tørvur á størri tillagingum nú fyri at røkka lutfallinum aftur, kann tað hava lutfalsliga stóra ávirkan á brúkarar av skipanini, serliga nú nógvir føroyingar eru hart raktir av hækkandi kostnaðarstøði.

Upprunaliga lutfallið kann røkkast aftur við, at sparingin í útreiðslunum til tilskotsheimilaðan heilivág verður í minsta lagi 4 mió. kr. í 2024.

Við at lækka sparingina til 4 mió. kr. í 2024 kann hækkingin í egingjaldinum verða munandi minni.

Undir viðgerðini av málinum hevur landsstýriskvinnan í heilsumálum gjørt nevndina varuga við niðanfyristandandi tastivillur í viðmerkingunum til lógaruppskotið:

1. Í talvuni á bls. 4, rað 4 um tilskot í % til pensjónistar og fyritíðarpensjónistar skal standa "30%"
2. Í talvuni á bls. 6 (Galdandi tilskotsstigi fyri 18-67 ára gomul), rað 1 og 2 skal standa ávikavist "0-587" og "587-1173"
3. Í talvuni á bls. 6 (Galdandi tilskotsstigi fyri persónar yvir 67 ár og fyritíðarpensjónistar) rað 1 og 2 skal standa ávikavist "0-587" og "587 til 1173"

Minnilutin setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í § 1 verður í § 18, stk. 2 "1.000 kr." broytt til: "967 kr."

2. Í § 1 verður § 18, stk. 3 orðað soleiðis:
"*Stk. 3.* Eru útreiðslurnar til heilivág innan fyri eitt ár yvir 967 kr., er tilskotið:
1) 40% av tí partinum av útreiðslunum, sum er yvir 967 kr. og upp til 1.574 kr.
2) 60% av tí partinum av útreiðslunum, sum er oman fyri 1.574 kr. og upp til 3.148 kr.
3) 75% av tí partinum av útreiðslunum, sum er oman fyri 3.148 kr. og upp til 6.296 kr.
4) 100% av tí partinum av útreiðslunum, sum fer upp um 6.296 kr."

3. Í § 1 verður í § 18, stk. 4 "600 kr." broytt til: "967 kr."

4. Í § 1 verður § 18, stk. 5 orðað soleiðis:
"*Stk. 5.* Eru útreiðslurnar til heilivág innan fyri eitt ár yvir 967 kr., er tilskotið:
1) 40% av tí partinum av útreiðslunum, sum er yvir 967 kr. og upp til 1.974 kr.
2) 60% av tí partinum av útreiðslunum, sum er oman fyri 1.974 kr. og upp til 2.500 kr.
3) 75% av tí partinum av útreiðslunum, sum er oman fyri 2.500 kr. og upp til 2.800 kr.
4) 100% av tí partinum av útreiðslunum, sum fer upp um 2.800 kr."

<u>Viðmerkingar</u>
Við hesum broytingaruppskoti minka útreiðslurnar hjá Heilsutrygd við 3.945.398,98 kr.

Broytti tilskotsstigin fer sambært broytingaruppskotinum at síggja soleiðis út:

Tilskotsstigin pr. 1. januar 2024							
18 ár til pensjónsaldur		Tilskot %	Egingjald í kr.	Pensjonistar og fyritíðarpensjonistar		Tilskot %	Egingjald í kr.
-	967	0%	967	-	967	0%	967
967	1.574	40%	364	967	1.974	40%	604
1.574	3.148	60%	630	1.974	2.500	60%	210
3.148	6.296	75%	787	2.500	2.800	75%	75
6.296	-	100%		2.800	-	100%	
Egingjald í alt			2.748	Egingjald í alt			1.857
Pr. mðr.			229	Pr. mðr.			155
Broyting í egingjaldi pr. ár			371	Broyting í egingjaldi pr. ár			337
Broyting í egingjaldi pr. mðr.			31	Broyting í egingjaldi pr. mðr.			28
Mett sparing 3.945.398,98							

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 6. desember 2023

Jørgen Niclasen formaður	Liljan Weihe næstformaður	Kaj Leo Holm Johannesen
Johan Dahl	Árni Skaale	Hans Jacob Thomsen
	Súsanna Bertholdsen	